Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Starvsnormeringar hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv tað vildi kostað mánaðarliga at sett námsfrøðingar í føstum starvi, sum arbeiða á serdeildunum á fólkaskúlaøkinum, í fult starv við setanarbroti á 1,0?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rímiligt, at fast settir námsfrøðingar á serdeildum í fólkaskúlanum hava lægri setanarbrot samanborið við líknandi námsfrøðingar á miðnámsskúlaøkinum?

3. Kann landsstýrismaðurin greiða frá og grundgeva fyri, hví setanarbrotið hjá námsfrøðingum á fólkaskúlaøkinum er væl lægri enn setanarbrotið á miðnámsskúlaøkinum, tá talan er um serdeildir?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa viðurskiftini soleiðis, at námsfrøðingar á serøkinum í fólkaskúlanum verða settir í fult starv við einum setanarbroti á 1,0 og fáa eins setanarviðurskifti sum námsfrøðingarnir, sum virka á serdeild á miðnámsskúlaøkinum?

Viðmerkingar:
Tað eru níggju sertilboð/serflokkar skipað í Føroyum. Ymiskt er, hvussu hesi sertilboð/serflokkar eru í støddd og skipan. Felags fyri øll tilboðini er, at tey eru skipað soleiðis, at ein skúli umsitur sertilboðið og tekur tískil næmingar inn frá einum ella fleiri skúlum í nærumhvørvinum.

Á sertilboðunum starvast lærarar og námsfrøðingar. Lærararnir í føstum starvi eru settir við setanarbroti 1,0, meðan flestu námsfrøðingarnir í føstum starvi, hóast fleiri tímar saman við næmingunum, eru settir við setanarbroti 0,85 ella lægri. Tá talan er um at menna næmingar á serdeildini, arbeiða námsfrøðingar og lærarar í samráði og samstarvi í sjálvstýrandi toymi.

Høvuðsuppgávan er at ráðleggja, gjøgnumføra og eftirmeta skúladagin hjá næmingunum. Arbeitt verður út frá læruætlanum hjá einstaklinginum. Í slíkum arbeiði er avgerandi, at menningin er ein heildarmenning, har barnið hvílir trygt í, at øll starvsfólkni hjálpa til, har tørvurin er. Hetta er tó sera torført, tá setanarbrotini til føstu størvini eru ólík. Tí vildi tað tænt serskipanini á fólkaskúlaøkinum, at námsfrøðingarnir á serdeildum fólkaskúlans, eins og námsfrøðingarnir á miðnámi,

vóru settir við setanarbroti 1,0 og kundu virkað á jøvnum føti saman við lærarunum og børnunum á serøkinum til frama.

Á Løgtingi, 5. apríl 2022

Djóni Nolsøe Joensen